# Norðurlandahúsið kom inn í framtíðina

**Kunningarstovurnar í Havn og Runavík eru nú beinleiðis á netinum hjá Norðurlandahúsinum. Hetta fer at betra munandi um atgongumerkjasøluna**

NORÐURLANDA-HÚSIÐ
*Jákup Mørk*



*»Nú komu tit aftur eitt fet nærri Havnini« tók Heðin Mortensen skemtiliga til, tá hann saman við Rodmuni Nielsen úr Runavík ognaði sær fyrstu atgongumerkini umvegis nýggju atgongumerkjaskipanina*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Tit eru sjey vinfólk, sum øll ætla tykkum til konsert í Norðurlandahúsinum. Farið verður til Kunningarstovuna, men ólukkutíð, so ber ikki til hjá tykkum at sita saman. Bert fýra tykkara kunnu sita lið um lið, meðan hini trý mugu sessast aðrastaðni í salinum. Ikki tí, nógv atgongumerki eru enn eftir, men tey plássini, sum kundu bjarga hesum, eru latin kunningarstovuni í Runavík.

Soleiðis kundi støðan í øllum førum vera fram til mánamorgunin, men tá hendi ein stór broyting. Nýggj skipan til sølu av atgongumerkjum varð nevnliga tikin í nýtslu, og so er ikki neyðugt, at atgongumerki verða send runt landið.

Nú kunnu kunningarstovurnar – fyribils í Havn og í Runavík – nevnliga síggja eina skíggjamynd av salinum, og á hesari sæst so eisini, hvørji pláss eru tøk. Á tann hátt kunnu atgongumerkini keypast til júst tey setrini, sum keyparin hevur hug til. Væl at merkja, um hesi ikki longu eru seld øðrum.

Helga Hjørvar, sum hesa vikuna afturat stjórnar Norðurlandahúsinum, helt fyri, at hetta hjá sær var ein stórur dagur.

– Seinasta vikan er sjálvandi altíð serlig, og tá vit nú eisini kunnu seta eina ætlan í verk, sum vit hava arbeitt við í fýra ár, er tað sjálvandi serligt hjá mær. Eg eri í øllum førum sannførd um, at hetta er nakað, sum fer at betra munandi um tænastu okkara, og á ein hátt flyta brúkaran nærri húsunum, staðfesti hon.

Enn eru tað so bara kunningarstovurnar í Havn og Runavím, sum eru knýttar at skipanini, men stjórin ætlar, at hetta samstarvið skal víðkast.

– Vit hava við vilja ikki tikið ov nógv í einum. Sum so eru tað mest Ingigerð á Trøðni frá Kunningarstovuni í Havn og eg, sum hava arbeitt við málinum, men síðani er ein fyrispurningur so komin úr Runavík, og tí vildu vit ikki avvísa.

– Kunnu vit staðfesta, at skipanin riggar júst soleiðis, sum hon skal, so er næsta stigið helst at fáa aðrar kunningarstovur við í samstarvið, og at enda eisini at koma on-line við endaliga brúkaran. Nakað sum í seinasta enda vil hava við sær, at atgonumerki kunnu keypast beinleiðis um alnetið, so skjótt eitt tiltak verður sett á skránna.

# Klárt at byrja

**Fremmand ungfólk fara á útbúgvingarstevnu, sum um dagarnar verður hildin á føroyskum lærustovnum, at siga frá um møguleikar at søkja størv og um framtíðar arbeiðsmarknað yvirhøvur**

ÚTBÚGVING
*Edvard Joensen*



Um dagarnar veðrur útbúgvingarstevnan Markleys Útbúgving hildin á føroyskum lærustovnum. Í hesum sambandi eru fýra donsk ungfólk komin hendanveg at siga frá um møguleikar fyri at sleppa út á framtíðar arbeiðsmarknaðin eftir lokna útbúgving.

Hesi fýra fólkini fara at greiða frá einum serligum tiltakið, sum tey nevna »Klárt at byrja«, ella á donskum »Parat til start«.

Møguleiki verður at hoyra hesi fólkini siga frá á Miðnámsskúlanum á Kambsdali mikudagin, og í Studentaskúlanum í Hoydølum hósdagin. Báðar dagarnar frá klokkan 13.00 til 15.30. Skráin hesar dagarnar er hendan: Frmløg um framtíðar arbeiðsmarknað. Um at søkja starv og um starvssamrøður. Globaliseringin.

Tosað fer millum annað at verða um, at tað, at menna sínar førleikar til annað enn bara at taka eina útbúgving, sigur Fróðskaparsetrið millum annað í tíðindaskrivi, sum sent er í samband við stevnuna. Greitt verður frá, hvussu týðandi persónligu førleikarnir eru, tá tú skal klára teg sjálvan í byrjanini av arbeiðsmarknaðarlívinum. Eisini verða upptøkur vístar, har vinnulívsfólk siga frá, hvussu veruliga lívið á arbeiðsmarknaðinum er.

Ferðin í Føroyum er partur av rundferð hjá hesum fýra ungu fólkunum, sum eisini hava ferðast millum skúlar í Danmarks, har tey hava greitt frá tiltakinum »Parat til start«.

Tann, sum vil hava meira at vita um tiltakið, hevur møguleika til tess á heimasíðuni, sum eitur www.parattilstart.nu.

## Rætting

Í viðtaluni við Jógvan við Keldu um Smyril og skotlandssigling í blaðnum í gjár, hevði ein lítil villa snikt seg inn ímillum.

Í fyrstu reglu stóð, at Smyril fór ikki at sigla ímillum Suðuroy og Havnina. Men sum tað stendur bæði í yvirskriftini og alla aðrastaðni í greinini, skal tað sjálvandi standa, at hann fer ikki at sigla ímillum Suðuroynna og Skotland

**-blaðm-**